Vestmanna 30 apríl 2023

Hoyringsskriv ísv. Uppskot til broyting í veiðugjaldslógini.

(Frá Felagnum trolbátar, umboðandi smærru trolbátanar á landgrunninum)

Bólkur 4T hevur í mong ár veri partur av makrelbýtinum. Tíðarskeið 2007-2016 var sera avbjóðandi fyri bólkin ímun til siðbundna fiskaríði, og tá fóru eisini fleiri av bátunum av knóranum. Avbjóðingar í rakstrinum hesi árini var ein orsøk til at fleiri bátar í bólkinum valdu at troyta nýggju makrel-møguleikanar í 2010, hóast vit vistu tað var avbjóðandi at fiska makrel við so smáum trolbátum. Íløgur í reiðskap, sum var egnaður/tillagaður makrelfiskiskapin prógvaði skjótt at bólkurin kundi fiska makrel undir røttu umstøðum, bæði við pumpuskipan (3 skip í felag) og sum siðbundin partroling, hvar móttøkuskip førdi fiskin til lands. Soleiðis bleiv bólkur 4T partur av býtislykilinum av makrelinum í 2010-2012.

Eftirfylgjandi broyttist skipanin/reglugerðin, so at bólkurin kundi leigaði sær skip at fiska sína kvotu og harvið fingu vit gagnnýtt okkara tillutaða part.

Seinni bleiv skipanin aftur broytt, hvar rættindir og stál blivu sundurlisin. Soleiðis kundi avtala framyvir gerast millum rætindahavara og uppisjóarskip, hvar Rættindahavari móttók 60% av veiðuvirðinum og skipi sum fiskaði kvotuna, móttók 40% av veiðuvirðinum.

Soleiðis hevur bólkurin tillaga sína gagnnýtslu av tillutaðu kvotuni, undir skiftandi samgongum við ymiskum ásetingum og skipanum.

Frammhaldandi gagnnýstlan av makrelkvotuni í bólkinum, er ein stór orsøk til at flestu bátanir framvegis varveita sínar manningar, skilt á tann hátt at makrelkvotan er við til at kunna løna hvørjum starvsfólki við einum árligum lønaríkoyti sum svaraði til áleið 5.000kr um mánaðin.

Ætlaðu broytingarnar um at strika undantaki um veiðugjald, kemur at kroysta okkara starvsfólk/løntakarar fíggjarliga, við eini lønarlækking á ca 2.000-2.500kr um mánan. Hetta er ørkymlandi fyri okkara manningar, tá vit síggja at aðrir lønarbólkar í landinum standa fyri stórum lønarvøkstri í hesum tíðum.

Bólkurin er farin frá áleið 20 skipum í 2004, niður í 6 fullriknar trolbátar frá 2021 til í dag, svarandi til ca 24-28 starvsfólk. Inntøkan av makrelinum seinnu árini hevur í miðal staði fyri áleið 10-15% av okkara inntøkum, hetta svarar til áleið 700.000-800.000kr til manning og reiðarí at deila. Hesin umsetningur, hevur "lønar-lyft" hvørt starvsfólk við áleið 60.000kr árliga (svarandi til áleið 5.000kr/mdr). Avbjóðingin at finna arbeiðsmegi/starvsfólk til hesar bátar er sera stór, men orsøkin til at fleiri av hesum 24-28 starvsfólkum hava valt at halda fram í sínum starvi seinastu árini, er júst nevnda lønaríkoytinum at takkað. Eggjanin til at halda áfram í starvi sínum, hevur spælt ein stóran leiklut í at bátanir hava kunna veri í drift í teimum avbjóðandi tíðarskeiðunum seinasu mongu árini.

Tað sum landið kemur at fáa í tilfeingisgjaldi frá hesum bólki, verður góðar 2 milliónir í 2023. Hesir penganir svara til at hvør av teimum 24 starvsfólkunum missir áleið 25.000kr í inntøku í 2023. Fyri reiðaríðini merkir tað at tey koma hava góðar 100.000kr minni til árliga raksturin hjá hvørjum av teimum 7 bátunum. Ein og hvør dugur sostatt at skilja at tað hevur sera stóran fíggjarligan týdning, at undantaki heldur fram fyri hendan skipabólk og teirra manningar/starvsfólk.


Politiska skipanin hevur seinastu 10-12 árini, reint lóggliga, amputera møguleikanar hjá bólkinum sjálum at gagnnýta kvotuna, heldur enn at stuðla undir møguleikanar at bólkurin í felag kann gagnýta sína makrelkvotu skilagott. Fíggjarmálaráðið og limir í fíggjarnevndini selja hugskoti/uppskoti um at strika undantaki, undir slagorðunum “sama fiskaslag sama gjald”. Júst hetta avdúkar hvussu avmarka politiska innlitið er í okkara tilveru, og hvørja ávirkan avtøkan av undantakinum hevur á okkara skipabólk. Hvør skipabókur livir í sínum egna verðuleika og undir ymiskum økonomiskum fortreytum, herundir starvssáttmálar, rakstrarkostnaðir v.m. Tískil er tað ógvuliga ymiskt hvussu eitt fast ásett veiðugjald ávirkar ymsu skipabólkanar. Eitt nú rinda summir skipabólkar áleið 30% av teirra veiðivirði til manningarnar og summir skipabólkar rinda omanfyri 40% av sínum veiðivirði til manningarnar. Bólkur 4T rindar góð 40% í lønum av sínum veiðivirði til manningarnar, sostatt ávirkar gjaldi sera nógv okkum, og er tað tá at líkna við ein eyka skatt ímun til tann skipabólkin sum eitt nú rindar 30% í lønum. “Sama fiskaslag sama gjald” meta vit bert kunna brúkast í teimum førum har umstøðurnar at virka eru eins.

Felagið trolbátar meinar tað eisini vera grundleggjandi skeivt at krevja skip í heimaflotanum eftir veiðigjaldi, sum fiska sína makrelkvotu sjálvi. Eitt framhald av undantakinum vil eggja partum av heimaflotanum at royna fiska sín part sjálvi og harvið eisini vera við til at lækka veiðutrýsti á botnfiskastovnanar, í tíðarskeiðnum tey fiskiførini royna eftir makreli.

Felagið Trolbátar hevur í mong ár víst á munagóðar loysnir, sum vildu gjørt umstøðurnar rundanum siðbundna fiskaríði hjá bólki 4T munandi betri. Men hóast óteljandi fundir í fiskimálaráðnum, er framvegis ongin politiskur vilji at hóma til at fremja batar. Júst betraðar umstøður til heimaflotan, hava limir í fíggjarnevndini eisini brúkt sum argument fyri at strika undantaki. Ráðini og boðini hjá Bólki 4T ímun til hendan vinkulin, eru tískil, gevið okkum betraðar umstøður at virka undir áðrenn undantaki verður strika.

Vónandi hevur fíggjarnevndin virðing fyri okkara samlaða tilverugrundarlagi, og letur undantaki fyri veiðigjaldi halda fram fyri bólk 4T so leingi sum ongir inntøkumøguleikar vera settir ístaðin fyri tað man nú ætlar at taka frá bólkinum.

Vegna nevndina í Felagnum trolbátar



Bjarni í Skálum, form.